Grønlandstíðindi Kári við Stein

Grønlandstíðindi:

# Nógv jákupsskel at fáa

Kári við Stein er væl umtóktur av føroyskum fiskimonnum í Grønlandi, eisini takkað verið hansara áhugaverdu tíðindi í Sosialinum. Teir syrgja fyri, at Kári ikki manglar føroyskan mat. Her eru hansara seinastu tíðindi



*Her við bygdina Sarfanguaq 40 fjórðingar frá Sisimiut var Kári um daganar á útróðri*

**19. oktober**
Steffen C er í Nuuk og landar. Har er alt fult hjá teimum. Polar Amaroq er í Aasiat og landar í dag eisini.

**22. oktober**
Akamalik kom inn at landa og skifta fólk í dag. Teir høvdu verið úti í eina viku. Teir loystu kl. 18 í kvøld.

Ein óførur dagur hjá mær. Har vóru menn, sum høvdu 10 nátungar við til mín, og fóru teir í laka. Eg fekk eisini ein posa av turrum fiski úr Barentshavinum og tvey stykkir av spiki. Tað er gott at havi vinir, tað kann eg siga. Og ikki at forgloyma teir á Markus. Frá teimum kom ein ógvuliga penur veðrahálsur, sum hevði gingið í eini skor í Fugloy og so fýra nátar. Eg eri forsýnaður til næstu nátatíð. Stóra tøkk til tykkum, sum sleipa til mín.

**23. oktober**
Í dag kom skeljabáturin Sonja Kiil II inn at landa. Teir høvdu 20 tons av jákupskel. Hetta vóru stórar skeljar. Tað ganga 32-40 til kilo við rognum. Teir hava verið úti í 30 dagar. 13 fólk eru við nú. Tað plagar at vera um 20 fólk. Prísurin, sum er lágur enn fyri skeljar, liggur um 64 kr fyri kilo. Pilkarnir fáa 16 kr fyri at pilka (hola) 1 kilo av skeljum.

Lómur kom inn til Illulisat við 125 tonsum í morgun, og Polar Natarnaq var inni í Aasiat og landaði næstan fulla last.

**26. oktober**
Sisimiut kom inn at landa tað síðsta av kvotuni á tí norðara feltinum, gott 250 tons. Teir skiftu fólk samstundis. Teir loystu um kl 19, og so legði Natarnaq at við fullari last.

Kanadiarin Oujukuaq, sum roynir við gørnum eftir svartkalva, kom inn at landa í morgun. Teir hava 110 tons inni. Teir greiddu frá, at svartkalvin var minni í ár í støð, og teir royndu heilt niðri á 1000 m sjógvi. Teir skulla gevast nú. Teir hava 250 gørn standandi. Tey skulla dragast, áðrenn farið verður til hús.

**27. oktober**
Polar Princessan var inni í Aasiat og legði gott 100 tons upp av svartkalva. Nú skuldu teir fara at royna eftir teirri sunnaru kvotuni.

**28. oktober**
Qaqqatsiaq er inni í Manitsoq og landar. Har er so at siga alt fult hjá teimun. So hendi tað undrið, at Polar Princessan sendi Mobbátin inn eftir onkrum deili. Teir høvdu við eina forskotna jólagávu til mín. Ein heilan posa av røstum fiski fekk eg frá teimum. Túsund takk fyri tit har umborð. Veturin er enn einaferð bjargaður.

**29. oktober**
Polar Qaasiut kom inn í morgun at landa. Teir hava gott 340 tons inni. Lómur kom til Illulisat við 130 tonsum í morgun. Tað sama gjørdi Polar Natoralik. Teir komu til Nuuk at landa knapt 500 tons.

---

# Heilivágur móti svínakrími uttan resept




*Tamiflu kann frá í morgin keypast á norskum apotekum - uttan resept*

**Í morgin kunnu fólk í Noregi, sum kenna seg sjúk, fara á apotekið og keypa tamiflu og relenza - uttan resept. - Hetta er eitt týdningarmikið átak, sigur norskur ráðharri**

HEILIVÁGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kendi heilivágurin móti svínakrími - tamiflu – verður frá í morgin seldur á norskum apotekum uttan resept. Tað verður heilivágurin relenza eisini. Sagt verður, at hesi sløg av heilivági virka fyribyrgjandi móti krími.

Tað er norska Helse-og Omsorgsdepartmentet, sum í dag boðaði frá hesum í tíðindaskrivi.

Frá í morgin at rokna verða hesi sløg av heilivági móti svínakrími soleiðis latin uttan resept - men ikki heilt uttan treytir.

- Hetta er eitt týdningarmikið átak, sum kemur at gera tað lættari hjá fólki at fáa fatur á hesum heilivági, og sum tískil eisini kemur at gera tað lættari at fyribyrgja svínakrími, sigur norski heilsu-og umsorganarráðharrin, Anne-Grethe Strøm-Erichsen.

Skipanin er galdandi fyri sjúklingar sum hava krímsjúku, fólk, sum ansa øðrum, ið hava krímsjúku og fyri fólk í vandabólkinum sum eru útsett fyri smittu.

Heilivágurin kann heintast av sjúklingi ella av øðrum, sum heinta hann fyri sjúklingin. Tá heilivágurin verður heintaður, skal latast inn eitt útfylt oyðiblað til apotekið. Hesi oyðibløð kunnu heintast á heimasíðuni www.pandemi.no.

Viðgerð við tamiflu og relenza kann stytta um sjúkutíðina og kann eisini minka um vandan fyri øðrum trupulleikum undir sjúkraleguni.

# Helgi Abrahamsen spyr um afturlatin dagtilhald

**Nú eitt ár er farið, síðan sparingar vórðu framdar á økinum, sum fevnir um dagtilhald, heldur løgtingsmaður Sambandsfloksins, Helgi Abrahamsen, at áhugavert hevði verið at vitað, um døpru forsagnirnar hildu**

DAGTILHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á tingfundi í dag fer Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður Sambandsfloksins at spyrja Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu, um avleiðingarnar av, at játtanin til dagtilhaldini er skerd.

Løgtingsmaðurin fer at spyrja landsstýriskvinnuna, hvussu nógv dagtilhald fyri pensjónistar eru latin aftur í 2009, og hvussu nógvir pensjónistar í ár hava mist møguleikan at vitja dagtilhaldini?

Helgi Abrahamsen vísir í sínum viðmerkingum á, at tá løgtingsfíggjarlógin fyri 2009 var til viðgerðar fyri einum ári síðan, varð nógv gjørt burtur úr, at játtanin til dagtilhaldini varð skerd.

Hann sigur, at fleiri almennir fundir vóru, har ljós varð varpað á týdningin av at hava dagtilhald kring landið, og eisini í fjølmiðlunum varð fokus sett á ætlaðu sparingina, sum varð skírd at vera eitt ógvusligt inntriv í trivnaðin og gerandisdagin hjá teimum eldru.

Nú eitt ár er farið, heldur løgtingsmaður Sambandsfloksins, at áhugavert hevði verið at vitað, um hesar døpru forsagnir hildu, og tí fer hann í dag at seta landsstýriskvinnuni henda fyrispurning um dagtilhaldini.



*Helgi Abrahamsen*